# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Oddvør Djurhuus 70 ár

Oddvør er fødd og uppvaksin í Hósvík, dóttir Hannu (Poulsen) úr Toftum í Hósvík, og Andrias Olsen undan Garðsenda í Hósvík.

Oddvør var sum barn og ung ógvuliga sjúk og fekk eina stóra hjartaskurðviðgerð í Danmark.

Í 1957, 19 ára gomul, giftist hon við Steintór Djurhuus, sonur Mariu (úr Froðba)og Óla Christian Djurhuus úr Hósvík.

Saman hava tey fingið 6 børn undan, sum nú við



maka, børnum og barnabørnum telja næstan 50.

Vit takka tær fyri, at tú ert sum tú tú ert, og ynskja tær ein góðan føðingardag og alt tað besta í komandi tíðum.

Føðingardagurin verður hildin heima á Rættarvegi 1.

Bestu heilsanir

**Børnini**




## Ellisakfør til Dals leygardagin




Leygardagin 16. august skipar áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri útferð til bygdina Dal á Sandoynni.

Áhugafelagið Føroya Ellisakfør skipar fyri útferð fyri limir við familju til Dals leygardagin 16. august.

Luttakararnir møtast í felagshølunum Yviri við Strond kl. 11.00 til morgunmat, og kl. 12.30 verður koyrt í raðkoyring til Gomlurætt. Í Sandoynni verður koyrt til tær ymisku bygdirnar í oynni, áðrenn farið verður til Dals.

Í Dali eru góðir møguleikar at sova í tjaldi á tjaldstaði. Eisini er møguleiki fyri at búgva á Eiriksgarði, har sovisalur er. Um kvøldið verður hugni við grillmati.

Fyri tey sum hava áhuga fyri tí, verður deknaguðstænasta í nýumvældu kirkjuni í bygdini sunnudagin kl. 12.

Meira um Sandoy og Dal sæst á heimasíðini: www.visitsandoy.fo

†

### Andlát og jarðarferðir

**Súsanna Malena Guttesen,** vanliga nevnd Lena, fødd Johannesen, ættað av Norðskála búsitandi í Havn andaðist týskvøldið 12. august, 85 ára gomul.

**Kistan við Sylviu Hansen** fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin klokkan 15. Tey, ið vilja minnast Sylviu, kunnu lata eina peningagávu til KFUK. Konto í Eik.

**Hagbard Dalfoss**, ættaður úr Froðba, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin, 72 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum hósdagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju fríggjadagin klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, sum vilja minnast Hagbard, kunnu lata Føroya Felag Móti Krabbameini eina gávu, konto í peningastovnunum.

### Dagurin

**15. august. Mariumessa**. Hildin til minnis um himmalsferð Mariu. Dagurin varð eisini róptur mariumessa í hoyna. Tendringin um hetta mundið eitur í hoyna.

## Tøkk

Ein hjartans tøkk til tykkum øll, ið sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Maria Joensen**
**Vestmanna**

andaðist og varð jarðað.

Takk til Ingu Dam, prest, fyri góð orð. Takk til tykkum, sum hjálptu til í sambandi við jarðarferðina.

Takk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um hana seinastu tíðina. Takk fyri blómur og kransar og fyri peningagávur til Føroya Felag móti Krabbameini. Stór tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Mariu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna tey avvarðandi,*
**Hanni, Martin, Fía og Marner**